

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 11 - 2011

# Atlantic Petroleum brynjar seg til 2012

Atlantic Petroleum framleiddi í oktober 39.000 tunnur av kolvetni (boe). Meðal dagsframleiðslan var 1.258 tunnur. Felagið metir, at meðal dagsframleiðslan fyri alt árið verður 2.000  2.300 tunnur. Felagið sigur í seinastu børsfráboðan síni, at framleiðslan úr Chestnut er steðgað í løtuni orsakað av kravdum 5-ára eftirliti av framleiðslupallinum. Nú avmarkingar vóru í framleiðsluni úr Chestnut leiðini orsakað av vatninnspræningini varð avgjørt at framskunda hetta eftirlitið, ið annars eftir ætlan skuldi verða í 2012. Hetta ger at tað slepst undan at steðga framleiðsluni í 2012, tá framleitt verður aftur við fullari megi. 16 av teimum ætlaðu 21 døgunum uttan framleiðslu vórðu í oktober. Boringin av einum síðubrunni til verandi vatninnspræningarbrunn, ið skal fáa vatninnspræningina aftur í rættlag og økja um framleiðsluna, byrjaði í oktober og verður eftir ætlan liðug í november. Viðvíkjandi útbyggingini av Blackbird, so varð í oktober arbeitt við at leggja leiðingina uppá pláss, og stuðulsfarið Seven Atlantic hevur arbeitt við undirsjóvar fyrireikingunum. Áðrenn framleiðslan úr Blackbird verður sett í gongd skulu nakrar eftirkanningar gerast fyrst í november. _____